

## Ósemja í FA um vinnilív

**Skulu arbeiðarafeløg seta pengar í vinnulív, Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag?**
- Vit fara ikki at seta eina krónu í Faroe Seafood ella nakað annað vinnulív fyri at fáa gongd á aftur. Tað kemur ikki upp á tal, at vit fara at seta pening í vinnulív.

**Hvat heldur tú um, at feløg seta pening í vinnulív?**
- Eg haldi, at hetta skuldi verið steðgað!

**Fakfeløg hava áður sett pening í?**
- Ja, vit hava so sanniliga stuðlað, men mangan er lítið komið burtur úr. Í fleiri førum hava feløg mist miljónir av krónum í virkjum og skipum, sum fóru á húsagang, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther.

**Harry Benjaminsen, Tofta Arbeiðsmannafelag, er limur í FA. Eru tit fyri at seta pening í vinnulív?**
- Ja, vit hava avgjørt áhuga fyri at verða við í eini endurreisn av fiskavirkinum. Eg veit ikki, um vit kunnu gerast nakar primus-motorur í eini møguligari endurreisn, men vit eru í øllum førum sinnaði at verða við.

**Eiga tit lut í øðrum vinnulívsvirsemi?**
- Ja, vit eiga part í Landingarmiðstøð Føroya. Hetta hevur ikki verið nøkur ring íløga, sigur Harry Benjaminsen, formaður í Tofta Arbeiðsmannafelag.

# »Hin Waagsteinski Listalistin«




Eirikur Lindenskov

Ein av teimum mongu nýggju bókunum, sum koma út til jóla, er »Hin Waagsteinski Listalistin« – ein myndabók eftir Eyðun Waagstein í Havn.

– Ein sunnudag fyrr í ár sat eg og hugdi at fotomyndum á telduni. Av og á steðgaði eg við onkra mynd, sum eg sendi sum teldupost til Petur Øster, faktor á Prenta í Havn. Skoytti endingina "list" upp í myndatitlarnar. Hugsaði so ikki meira um hetta. Petur er skemtingarsamur maður. Nakrar vikur seinni kom hann á gátt og blakaði ein bókling á borðið við heitinum »Hin Waagsteinski Listalistin«. So flentu vit at tí.

Soleiðis sigur Eyðun Waagstein í fororðunum til bókina. Fotomyndirnar eru allar tiknar við vanligum digitalum lummakamera, tvs., at býtið er uml. 50/50 millum tvey kamera, tað eina er eitt Konica Minolta Dimage X50, meðan hitt er eitt Nikon Coolpix S210.

– Sostatt er ikki talan um professionella fotografering, men heldur nøkur snapshots á leiðini. Til at redigera myndirnar havi eg brúkt skipanina Picasa 3.

Tað er Petur Øster, sum hevur lagt bókina prentlistarliga til rættis, meðan Eyðun Waagstein hevur tikið allar mydirnar.

- Bókin hevur ongan ávísan málbólk, men ein og hvør kann blaða í henni og lata hugin reika, sigur Eyðun Waagstein.

Bókin fæst hjá H. N. Jacobsens Bókahandli og hjá Rit & Rák í SMS. Hon kostar 180 krónur.

*eirikur@sosialurin.fo*

## Í MORGIN




Skýggjað. Landnyrðingur, 10-13 m/s. Tað verður ælaveður. Hitin 2 stig.

## MIKUDAGIN




Klárt í veðrinum. Framvegis landnyrðingur, 8 m/s, ælaveður. Hitin um 2 stig.

## HÓSDAGIN




Klárt í veðrinum, stilli. Turt allan dagin. Hitin 3 stig.

**Veðrið jólaaftan**
Skýggjað, landnyrðingur-eystan, 9 m/s. Regn og ælaveður L. Hitin 4 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ







## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 142 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

13. desember — Fyrra kvarter
Mánin longst frá jørðini
21. desember — Fullmáni
25. desember — Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. des | 05:25 | 17:49 | 04:25 | 16:49 | 04:40 | 17:04 | 07:25 | 19:49 | 08:25 | 20:49 | 03:40 | 16:04 | 02:40 | 15:04 | 05:40 | 18:04 | 06:40 | 19:04 | 05:10 | 17:34 | 06:25 | 18:49 |
| 21. des | 06:14 | 18:40 | 05:14 | 17:40 | 05:29 | 17:55 | 08:14 | 20:40 | 09:14 | 21:40 | 04:29 | 16:55 | 03:29 | 15:55 | 06:29 | 18:55 | 07:29 | 19:55 | 05:59 | 18:25 | 07:14 | 19:40 |
| 22. des | 07:06 | 19:32 | 06:06 | 18:32 | 06:21 | 18:47 | 09:06 | 21:32 | 10:06 | 22:32 | 05:21 | 17:47 | 04:21 | 16:47 | 07:21 | 19:47 | 08:21 | 20:47 | 06:51 | 19:17 | 08:06 | 20:32 |
| 23. des | 07:58 | 20:22 | 06:58 | 19:22 | 07:13 | 19:37 | 09:58 | 22:22 | 10:58 | 23:22 | 06:13 | 18:37 | 05:13 | 17:37 | 08:13 | 20:37 | 09:13 | 21:37 | 07:43 | 20:07 | 08:58 | 21:22 |
| 24. des | 08:47 | 21:10 | 07:47 | 20:10 | 08:02 | 20:25 | 10:47 | 23:10 | 11:47 | - | 07:02 | 19:25 | 06:02 | 18:25 | 09:02 | 21:25 | 10:02 | 22:25 | 08:32 | 20:55 | 09:47 | 22:10 |